UTTAN ÚR HEIMI

# Ísrael lovar fleiri avrættingar


*Næstan 200.000 palestinar fylgdu til Abdel Aziz Rantissi til gravar sunnudagin. Tey kravdu hevnd fyri morðið*

*Mynd: Reuters*

**Palestinar svørja at hevna morðið á Hamas-leiðaran Abdel Aziz Rantissi. Ísraelska stjórnin sigur, at avrættingarnar fara at halda fram, og at tær hava givið úrslit**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Ballaður inn í tað palestinska flaggið varð Abdel Aziz Rantissi jarðaður í Gaza sunnudagin, eftir at ein rakett frá einari ísraelskari tyrlu gjørdi av við hann, son hansara og ein lívverja leygarkvøldið.

Rantissi varð jarðaður undir líðini hjá undanmanni sínum í Hamas-leiðarastarvinum, Ahmed Yassin, sum ísraelski herurin beindi fyri í síðsta mánað. Undir jarðarferðini varð ein bandupptøka við Rantissi spæld:

- Hamas fer ikki at doyggja, sama hvussu nógvar av leiðarum okkara Ísrael beinir fyri, segði Rantissi á bandinum, sum varð upptikið í síðstu viku.

Næstan 200.000 fólk fylgdu Rantissi til gravar, og mannamúgvan kravdi, at morðið verður hevnt. Ikki bara Ísrael stóð fyri skotum, men eisini USA.

- Bush og hansara umsiting eru drápsmenninir, tí teir góðkendu morðið, tá Sharon herfyri var í Washington, segði ein av Hamas-leiðarunum í einari røðu aftan á jarðarferðina.

## Halda fram

Meðan palestinar syrgdu Rantissi, rósti ísraelski forsætisráðharrin, Ariel Sharon, flogvápninum fyri væl útint arbeiði, og hann gjørdi greitt, at Ísrael fer at halda fram at beina fyri teimum, sum gera seg inn á ísraelska fólkið.

- Vit fara ongantíð at lata drápsmenn gera fólki okkara ilt. Teir, sum váða sær at gera tað, verða bardir niður, segði Sharon í einari røðu uttan fyri Holocaust-miðstøðina í Jerusalem.

Ein ísraelskur herovasti segði sunnudagin, at ein av Hamas-leiðarunum fjalir seg í Damaskus í Sýrialandi, men at hann skal ikki kenna seg tryggan.

- Fáa vit at vita, júst hvar hann er, fara vit eftir honum. At hann fjalir seg í sýriska høvuðsstaðnum, hevur minni týdning, segði herovastin.

Fleiri lond hava fordømt avgerðina at beina fyri Rantissi, og tað sama gjørdu ST-aðalskrivarin, Kofi Annan, og Jóhannes Páll pávi. USA hevur hinvegin ikki forfømt morðið.

- Ísrael hevur rætt til at verja seg, men vit hava fleiri ferðir sagt, at Ísrael má hugsa seg væl um, áðrenn tað tekur slík stig, segði ráðgevin hjá Bush, forseta, Condoleezza Rice, sunnukvøldið. Hon avsannaði, at Bush hevði góðkent avgerðina at beina fyri Hamas-leiðaranum.

## Givið úrslit

Í Ísrael er tað vanlig uppfatan, at avgerðirnar at beina fyri Hamas-leiðarunum hava givið úrslit. Ísraelskir eygleiðarar vísa á, at tá Ahmed Yassin varð myrdur, hótti Hamas við ógvusligum atsóknum at Ísrael, men at felagsskapurin hevur ikki verið førur fyri at fremja hóttanina í verki.

- Tað er vorðið langt ímillum orð og gerðir hjá teimum víðgongdu palestinsku bólkunum, og tað er vert at leggja til merkis, at vit hava ikki sæð eina einastu bumbuspreinging, síðani Yassin varð myrdur, sigur Gerald Steinberg, sum er professari á verjustovninum í Tel Aviv.

Summir eygleiðarar halda, at Ísrael fekk hjálp frá palestinskum svíkjarum til at beina fyri Rantissi, og at Hamas nú leggur størri dent á at finna svíkjararnar heldur enn at søkja at ísraelskum málum.

# Samgongan í Irak viknar

**Spania fer at taka sínar hermenn úr Irak innan 15 dagar. Nú stúra amerikanarar fyri, at onnur lond fara at gera tað sama**

IRAK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Sunnudagin kunngjørdi spanski forsætisráðharrin, José Luis Rodriguez Zapatero, at teir 1.300 sponsku hermenninir í Irak verða tiknir úr landinum innan 15 dagar. Hann heldur sostatt lyftið, sum hann gav veljarunum upp undir tjóðartingsvalið í síðsta mánað.

Men Spania verður neyvan tað einasta landið, sum fer at taka sínar hermenn úr Irak. Portugal hevur boðað frá, at landið umhugsar at taka sínar hermenn haðani, og stjórnin í Kasakhstan hevur gjørt greitt, at hon fer ikki at senda aðrar hermenn til Irak, tá tann deildin, sum er har nú, verður tikin heim um stutta tíð. Eisini í Noregi eru røddir, sum mæla til, at teir norsku hermenninir skulu takast úr Irak.

Trygdarráðgevin hjá George W. Bush, forseta, Condoleezza Rice, segði um vikuskiftið, at amerikanska stjórnin er greið yvir, at ávísar broytingar fara at henda í Irak. Aðrar amerikanskar keldur siga, at amerikanska stjórnin er ørkymlað av sponsku avgerðini, tí hon avdúkar veikleikar í hernaðarligu samgonguni í Irak. Amerikanski umsitingarleiðarin í Irak, Paul Bremer, hevur eisini ávarað londini ímóti at taka sínar hermenn haðani.

- Tær seinastu vikurnar hava víst, at Irak hevur tørv á útlendskari hjálp, segði Paul Bremer sunnudagin.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Pálli Bónda í Kirkjubø til minnis

Páll Patursson fór alt ov tíðliga av fold. Hesi fold, sum hann vígdi sítt lív til at fáa at grógva og kasta av sær, og har hann legði so nógv eftir seg.

Men sum lagnan legði leið hansara við sváru sjúkuni seinastu árini, var Páll uttan iva fegin um nú at finna seinastu hvíldina. Og hann hevði nógv at fegnast um. At Sólva, synir, verdøtur, abbabørn, systkin og familja kundu vera um hann á lívskvøldinum. At hann kundi vera heima á Garði - takkað veri kønu hondunum og stríðsviljanum hjá Sólvu. Og hann visti, at allur tann førningur, sum hann hevur borið fram á leiðina, og alt, sum hann hevur sátt, er í tryggum hondum og fer at grógva víðari hjá næsta ættarliðnum - og hjá teimum, ið koma.



Páll sáddi og skapti lív kring seg. Hann heystaði av náttúrunnar ríkidømi á sjógvi og landi. Og sum svágurin Zakarias skrivaði í heilsu til Páll á seksti-ára degnum, so bjargaði Páll eisini mannalívum við sínum árvakna eyga og skjóta atburði, tá sterku náttúrukreftirnar kring søguligu heimbygdina, gjørdu vart við seg.

Seinast eg sá Páll, var tá hann fylgdi verfaðirinum, Poul Wang, til gravar. Tá brúkti hann helst sínar seinastu kreftir til at geva einum øðrum merkismanni og hegnisbónda sína seinastu heilsan.

Tá Páll varð jarðaður henda framúr vakra dagin í Kirkjubø, kom eg at hugsa um hetta ørindið úr eini yrking hjá Karsten Hoydal, sum kundi verið skrivað til teir báðar:

*Eg heilsi tær á ytstu gátt*
*runnur av teirri rót,*
*sum kendi heilagt hetta landið,*
*hav og mold og grót,*
*í bø og haga livdi tú*
*í bjørgum og á miðum,*
*fekk sálarbreyð úr Halgubók,*
*úr søgn og fornum siðum.*

----

Páll var ein merkismaður í orðsins sanna týdningi. Hann hevði - sum allir ið eru bornir til Kirkjubøgarð - ein dýrabæran og tungan arv at lyfta, men hetta megnaði hann til fulnar. Bæði handaliga og andliga bar Páll landbúnaðin og Kirkjubø inn í eina nýggja øld. Við sínum starvi og ídni - vinnuliga, mentanarliga og í kommunupolitikki - bygdi hann land allari tjóðini at frama.

Og ikki minst hava Páll og Sólva knýtt bond millum føroyingar og aðrar tjóðir, sum ongin undan teimum. Allir teir útlendsku gestir - høgur sum lágur - ið hava notið blíðskapin og ta livandi søguna í heiminum hjá Pálli og Sólvu, hava knýtt ógloymandi minnir og ríkar upplivingar til Føroya. Og tey hava leitað aftur ella hava borið heilsur til Kirkjubøar úr øllum heimsins heraðshornum.

Við Pálli og Sólvu á odda hevur Kirkjubøur verið besta umboðsstova fyri altjóða samstarv føroyinga. Ikki minst hava Føroya Løgting og Føroya Landsstýri havt almikið gagn av blíðskapinum og móttøkunum heima á Garði, og tað vil eg nýta høvi at takka og minnast Páll fyri.

Øll, sum upplivdu Páll greiða frá sínum virki og frá søguni hjá bygdini og síni slekt, gjørdust hugtikin. Her var ein maður, sum í 17. ættarliði hevði borið arvin víðari og sum greiddi frá Sverra Kongi og Erlendi Bispi eins og hevði hann hitt teir á máli.

Men Páll livdi ikki í søguni. Hann var livandi søga í nútíðini. Eins og fedrarnir undan honum, so var Páll sera fornur og hevði djúpa virðing fyri søguligu virðunum, samstundis sum hann var toppmodernaður tá tað tildømis snúði seg um nýggjar framleiðsluhættir og tøkni.

Fyri hann var søgan ikki í andsøgn við framtíðina ella bert ein leivd, ið vit skulu minnast ávísar dagar á árinum. Páll vildi skapa framtíðina við á byggja á tey bestu virðini úr søguni, men samstundis vera opin fyri nýskapan og øllum tí, ið kundi skapa framburð.

Tí stríddist hann áhaldandi fyri, at søguligu virðini og fornminnini skulu kunna brúkast og gerast partur av eini livandi framtíð - og at tey ikki bert skulu goymast í glasbúrum ella á søvnum. Tað er ein hugsan, sum vónandi fer at vinna frama í komandi tíðum.

---

Góða Sólva. Tú hevur verið en fyrimynd fyri onnur og víst eina ótrúliga styrki, tá sjúkan og mótgongdin rakti. Vit eru mong, ið hava samkenslu við tær, Jóannesi, Siggerti og Pouli við familjum - eins og við systkum og øllum, ið stóðu Pálli nær. Vónandi kanst tú framhaldandi finna styrki í samanhaldi tykkara og øllum tí góða, ið tú og Páll skaptu saman, og sum ongantíð ferst.

Við hesum fáu orðum, vil eg lýsa frið yvir minnið um merkismanin Páll Patursson.

**Høgni Hoydal**

## Starvsdagur



Árni Nielsen, Lopra, hevur í dag arbeitt sum linjumaður hjá elfelagnum SEV í 40 ár.

## Flaggdagshald í Skálavík

TÍÐINDASKRIV

Skipað verður fyri flaggdagshaldi í Skálavík flaggdagin 25.04.2004 kl 15. Tað hevur áður ikki verið skipað fyri flaggdagshaldi í Skálavík. Stigtakarar til tiltakið eru KFUK-skótarnir í Dali, Húsavík og Skálavík, sum eftir nógv ár í dvala, hava tikið uppaftur virksemi.

Vár Berghamar Jacobsen, ið vit millum annað kenna frá sjónvarpssendingunum Likku-likkuleia førir fram flaggdagsrøðuna. Á skránni er eisini skrúðgonga úr skúlanum í Skálavík oman á Keldu, Betaniakórið úr Skopun fer at syngja og eisini verður møguleiki at keypa kakao og bollar.

Øll skulu vera hjartaliga vælkomin.

KFUK-skótarnir í Dali, Húsavík og Skálavík.

## 95 ár

21. apríl verður Elsa Olsen, Argjavegur 27, Argir, 95 ár.

Dagurin verður hildin við einum kaffimunni hjá soninum, Traðargøta 31, frá kl. 16.00 til 21.00.

## Tøkk

Øllum tykkum mongu, sum við gávum, blómum, fjarritum, og annars við vitjan á flogvøllinum og heima við hús, gjørdu mær 25 ára starvsdagin ógloymandi, takki eg hjartaliga.

**Finnbogi Niclasen**
**Sørvágur**

## Dagurin

**20. apríl. Sulpicius**, deyður umleið 1115. Háborin rómverji, sum saman við einum øðrum, Serilianusi, gjørdist kristin; teir vórðu hálshøgdir.

## Føroyingar hittast í London

TÍÐINDASKRIV

Leygarkvøldið tann 24. apríl verður aftur møguleiki hjá føroyingum búsitandi í Stóra Bretlandi at hittast. "Øll eru vælkomin", sigur ein av stigtakarunum, Dánjal Rein.

Um alt gongur eftir ætlan verður byrjað við at hyggja eftir dokumentarfilminum hjá Ulla Boje Rasmussen, Færøerne.dk, sum hevði frumframførslu í Føroyum síðsta summar og hevur fingið góð ummæli. Filmurin hevur enskan undirtekst so til ber at bjóða vinum og kenningum við, sum annars ikki skilja føroykst.

Síðani verður farið út at eta á eini italienskari matstovu, Dolce Vita. Til ber at fáa tríggjar rættir fyri £20 íroknað borðfæ. Boðað frá um vegetarmatur ynskist. Drykkuvørur eru ikki íroknaðar.

Bæði støðini liggja 2 min frá Elephant & Castle Tube-station og 5 min frá Waterloo-station.

Til ber a faá innivist a Soutwark Rose Hotel fyri 85£ pr. kamar pr. nátt, írokn. full English breakfast. Hotellið liggur vid London Brigde, 10 min, frá Elephant & Castle.

Áhugað verða biðin um at tekna seg hjá Dánjal Rein við at senda ein teldupost til danjalrein@msn.com

Freistin at tekna seg er fríggjadagin 16.apríl.

†

**Vinnie Godtfred**

búsitandi í Revlingbakken 28, st. tv., 9000 Ålborg, andaðist tann 15. apríl, 62 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Søndre Kirkegård í Aalborg tann 26. apríl kl. 14.00.

**Hjørleif Splidt**